## DAGSINS MEINING

# Javnstøða við í Visjón 2015

Altjóða kvinnudagur er og verður hann mangan nýttur til at gera støðuna upp á javnstøðuøkinum. Støðan hjá kvinnuni hevur verið sera skiftandi gjøgnum øldirnar. Tað eru teir mannfrøðingar, ið vilja vera við, at í eini fjarari fortíð livdu stórir partar av mannaættini í matriarkati t.v.s. móðurveldi ella kvennveldi. Tað var altso kvinnan, ið var høvur ættarinnar og ikki maðurin. Sum nevnt hevur støðan verið svingandi. Tá fólkaræðið varð sett í hásæti vísti tað seg, at kvinnur fingu ikki sæti í lóggávutingunum á jøvnum føti við menn.

Hvussu er og ikki so má staðfestast, at støðan hjá kvinnuni hevur gjørt tað neyðugt at taka politisk stig til at fáa til vega javnstøðu í samfelagnum. Flestu fólkaræðilig lond hava út frá hesum sett í gildi lóggávu, sum ásetir ávís minstukrøv til javnstøðu. Eisini vit her í Føroyum hava fingið javnstøðulóg. Henda lóg ásetir, at kvinnur skulu vera umboðaðar í øllum almennum nevndum og ráðum. Lagt kann verða afturat, at ikki øllum dámar hetta, at javnstøða skuldi ásetast við lóg og hevur lógin sostatt ofta verið fyri hvøssum atfinningum.

Hóast formligu karmarnir um javnstøðu sostatt skuldu verið í lagi, eru vit fjart frá javnstøðu á politiska økinum. Sum kunnugt sita bert 3 kvinnur á tingi. Eingin kvinna er í landsstýrinum og í bý- og bygdaráðum eru kvinnur eisini undirumboðaar. Kvinnur eru helvtin av mannaættini. Kvinnur eru á flestum økjum eins væl útbúgvnar og menn, og kvinnur yvirhála menn innan alt fleri útbúgvingar. Hvat er so galið má ein spyrja? Hetta má hava nakað at gera við mentan og siðvenjur. Hetta hevur ivaleyst eisini nakað at gera við maktbygnaðin innan politisku skipanina at gera. ST, Norðurlandaráðið og Útnorðursráðið hava heitt á viðkomandi myndugleikar um at gera nakað munagott við trótandi javnstøðuna. Nú kann ikki bíðast longur.

Ein byrjan kundi verið, at politisku flokkarnir heilt einfalt tóku hetta mál upp og syrgdu fyri, at í hvussu so er helvtin av øllum valevnum i framtíðini eru kvinnur. Men tað er ikki nóg mikið, at kvinnur stilla upp. Veljararnir, tað veri seg kvinnur og menn, mugu so eisini gera sítt til at fáa glið á hesa gongd - at fáa framt hesa góðu og náttúrligu hugburðsbroyting í verki. Og tað gerst bert, um fleiri velja kvinnur. Hetta kundi so eisini verið ein av súlunum í Visjón 2015. Latið okkum tí taka dyggiliga undir við hesi góðu javnstøðuvisjón longu í Sjónleikarhúsinum í Havn í kvøld – á sjálvum kvinnudegnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# At verja kann gerast á ymsan hátt. Rúmligur arbeiðsmarknaður?



**LEILA SOLMUNDE**
Formaður í MBF

Kjakið sum tók seg upp í samband við fyrispurning á tingi um uppsagnirnar á Matrikulstovuni, endaði í einum kjakið um at verja fólk við brekið í starvsfólkapolitikkinum hjá alment settum fólkum. Tað er hetta seinasta eg vil gera nakrar viðmerkingar til, tí málið um uppsagnirnar havi eg onki innlit í og ætli mær ikki at viðgera.

Um vit í Føroyum taka støði í ST fyrimyndarreglunum eins og hini norðurlondini, so sigur meginreglan, at øll fólk skulu hava pláss á tí rúmliga arbeiðsmarknaðinum, eisini fólk við breki.

MBF tekur saman við Meginfeløg teirra brekaðu í Norðurlondum undir við tí handicap politiska útgangsstøðinum um líkarætt fyri fólk við breki á arbeiðsmarknaðinum. Tað byggir á meginregluna um líkarætt, mótvirði (kompensation) og økisábyrgd (sektorábyrgd).

Hetta merkir, at fyrst og fremst skulu øll fólk hava møguleika at verða sett í starv á jøvnum føti, eisini fólk við breki, og tá eru fólk við breki eisini vard av somu reglum sum øll onnur starvsfólk. Hetta skal gerast fyrst, áðrenn man byrjar at tosa um at finna størv, sum eru uppá serligar treytir. Vit skulu minnast til, at fólk við breki er ein sera breiður skarði av fólki, sum ikki allur kann viðgerast á sama hátt. Útgangsstøði má í hvørjum einstøkum føri verða tikið í einstaka menniskjanum.

Nógv fólk sum hava ella fáa eitt brek ella sjúku, kunnu verða verandi á arbeiðsmarknaðinum um arbeiðsplássið verður lagað til tann tørv viðkomandi hevur. Tað eru kanska bert nakrar smáar broytingar sum skulu til fyri at fáa hesi viðurskiftir at virka, sum til dømis serlig innrættan av arbeiðsplássinum ella persónlig hjálp á onkran hátt. Her tosa vit um kompensatión fyri tað brekið man nú hevur.

Tá hetta ikki er nóg mikið, eigur at verða hugt eftir øðrum møguleikum, sum kunnu fáa fólk á arbeiðsmarknaðin, eitt nú vart starv, endurútbúgving ella annað. Her eru ymsir sektorar sum hava ábyrgd á økinum, um at fáa sett skipanir í verk.

Um vit fara at taka fólk við breki burturúr rúgvuni og nevna tey serliga í setanarpolitikkinum og uppsagnarpolitikkinum, tá kunnu vit koma at gera meiri skaða enn gagn. Ongin arbeiðsgevari vil hava eitt starvsfólk sum er so vart av í uppsagnarpolitikkinum, at arbeiðsgevarin fær trupulleikar um hann ætlar at siga henda persónin upp. Tað er her eg meti vit kunnu koma at verða jaliga diskrimineraði, so at vit vera útihýst frá arbeiðsmarknaðinum heldur enn boðin vælkomin.

Vilja vit verða við á jøvnum føti, so lat okkum tað. So verður tað okkara fakligi førleiki sum skal avgera um vit fáa eitt starv, og ikki okkara brek. Eru vit so fyri órætti, eiga vit at brúka somu mannagongdir og skipanir, sum aðrir lønmóttakarar brúka, tá teir skulu kæra.

Skulu vit verjast sum borgarar við breki, tí vit ikki megna eitt starv á jøvnum føti við aðrar borgarar, so skulu vit arbeiða fyri at fáa settar skipanir í verk, sum kunnu verða okkum til frama. Tá eru tað hesar skipanir vit skulu seta fokus á. Vit eiga í Føroyum at gera meiri við skipanir um rúmliga arbeiðsmarknaðin, tí vit eru eftirbátar á økinum. Tá eg sigi eftirbátar, so er tað uppá ymsar mátar. Her eru fleiri sum hava ábyrgd. Tað er til dømis politiski myndugleikin, sum skal gera og fremja lógirnar á økinum, kommunurnar, aðalráðið sum umsitur arbeiðsmarknaðin, ALS, og ikki minst fakfeløgini, sum hava haft nógv av teimum sum fáa eitt brek ella sjúku sum limir.

Vit hoyra lítið um hetta, og onki alment kjak hevur verið um hetta.

**Framgongd hevur tó verið:**
Arbeiðsmarknaðardeildin hjá Almannastovuni, sum hevur gjørt eitt dygdargott arbeiði við at fáa fólk í vart starv, og við at fáa arbeiðsgevarar at síggja hesi fólkini sum eitt virðismikið tilfeingi til skaran av starvsfólkum.

Alv hevur síðstu árini sett fokus á ein bólk av samfelagsborgarum við sínum átøkum, og hjálpt nógvum fólkum til eitt virðiligt lív.

Komandi ráðstevna hjá Alv í apríl fer at seta meiri fokus á evnið, og kunnu lands- og kommunal politikarar og onnur sum skulu verða við, nú fáa møguleika at seta orð á sínar ætlanir á økinum.

Hyggja vit eftir skipanum í Danmark, so eru millum annað: Isbryderordningen, flexjob, skånejob og revalidering. Vit mugu hyggja eftir tí vit hava, og hvussu tað virkar, og hvat vit ynskja skal verða galdandi her á landi. Ynskja vit somu skipanir sum í Danmark, ella ynskja vit nakað annað.

Eitt kjak kann seta ljóskastararnar á økið og fáa politikarar at bøta um tað sum ikki er nóg gott. At verja fólk við breki, kann gerast uppá nógvar mátar, tí er umráðandi at hugsa seg um, og ikki leypa framav. At verða vardur, skal helst gagna og ikki skaða.

Vit hava í Føroyum tikið undir við ST fyrimyndarreglunum, so tað er onki sum forðar almennum myndugleikum at fremja ábøtur á rúmliga arbeiðsmarknaðinum. Tað krevur bara, at øll sum hava ábyrgd, síggja týdningin av hesum, bæði Løgtingið, Landstýrið , kommunurnar, Als og fakfeløgini.

MBF vónar at kjakið, sum nú tók seg upp, vil verða við at fremja enn fleiri átøk hesum borgarum at gagni.


Illur???

Sig tína meining í Sosialinum






**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.